FISKIMÁLARÁÐIÐ

Løgtingið
Tinghúsvegur 1-3
Postboks 208
110 Tórshavn

3. mai 2021
Mál: 21/06651-2
(at tilskila í svari)

Tygara skriv: 52-126/2020

Svar til § 52a fyrispurning nr. 52-126/2020 frá Beintu Løwe Jacobsen, løgtingsmanni, um broyting í kunngerð um trolveiðu innan fyri 12 fjórðingar

Spurningar:

1. Hví hevur landsstýrismaðurin broytt kunngerðina um trolveiðu innan fyri 12 fjórðingar?
2. Hvør er ítøkiliga broytingin?
3. Feløg, ið umboða útróðrarbátar, hava gjørt vart við, at broytingin í kunngerðini fer at hava avleiðingar fyri útróðurin. Er landsstýrismaðurin samdur við útróðrarfeløgunum í hesum?

Svar til nr. 1.
Málið er tikið upp, tí Felagið Trolbátar hevur heitt á Fiskimálaráðið um at gera tvær broytingar í kunngerðini um trolveiði innan fyri 12 fjórðingar, so loyvt verður at trola innan fyri 12 fjórðingar árið út, samstundis sum ásett verður, hvussu nógvar dagar hvør bátur kann royna innan fyri 12 fjórðingar.

Svar til nr. 2.
Eftir verandi reglum er í flestu førum loyvt at trola frá 24.05 til 07.09, tó undantikið 3 vikur á hásumri. Viðvíkjandi fiskidøgum er verandi skipan, at fiskidagar, brúktir innan fyri 12 fjórðingar, verða roknaðir frá dagatalinum, ið hvør bátur hevur sum trolbátur í bólki 4 T. Onki mark er í verandi kunngerð fyri, hvussu nógvar av fiskidøgunum, hvør trolbátur kann brúka innan fyri 12 fjórðingar.

Broytingin viðvíkjandi leiðum og tíðarskeiðum er, at við grundarlagi í tilmæli frá Havstovuni verður áheitanin frá Felagnum Trolbátar eftirlíkað soleiðis, at í 2021 verður sum ein roynd loyvt trolbátunum at trola innan fyri 12 fjórðingar í ásettu køssunum og tíðarskeiðum soleiðis: Kassi B frá 1. mai til 31. desember og kassarnir A1, A2, D1, D2, E, F, G, H, I, J frá 1. mai til 7. september. Tíðarskeiðið fyri kassa C verður óbroytt frá 1. juni til 17. juli.

Svar til nr. 3.
Í sambandi við hoyringina av kunngerðini hava fleiri partar latið Fiskimálaráðnum hoyringarskriv, harímillum eisini eigarar av og feløg umboðandi ymiskar útróðrarbátar. Flestu av hesum siga seg ikki taka undir við broytingunum.

Landsstýrismaðurin hevur umhugsað viðmerkingarnar, men hevur tikið avgerð um at halda fast við broytingarnar, sum tó bert verða gjørdar galdandi í 2021. Tá árið er farið, verður høvi at umhugsa møguligar broytingar, sum kunnu verða viðkomandi at gera við støði sum fiskiskapurin hjá trolbátum og útróðrarbátum undir broyttu fortreytunum hevur lagað seg í 2021.

Jacob Vestergaard
landsstýrismaður